# Slóðbrótandi stuðulsavtala

**Sum nakað heilt nýtt innan stuðul til ítróttarfeløg hava SMS, Kaupting og Føroya Tele valt at stuðla besta mansliðnum hjá Neistanum við samstundis at stuðla Føroya Felag Móti Krabbameini**



Myndir: *Álvur Haraldsen*

Besta mansliðið hjá Neistanum fer at leika við búmerkinum hjá Føroya Felag Móti Krabbameini á bringuni. Eisini verður eitt telefonnummar, 905600, prentað á búnan, sum fólk kunnu ringja til og stuðla felagnum. Fyri hvørt uppkall fara 25,- kr. óskerdar til Krabbameinsfelagið.

- Hendan avtalan prógvar, at ítrótturin, vinnan og feløg, sum t.d. Føroya Felag Móti Krabbamein, avgjørt kunnu standa saman og gera gagnligar samstarvsavtalur sína millum, sigur Kjartan Thomasen, formaður í Neistanum, sum fegnast um avtaluna.

Jákup N. Olsen, formaður í Føroya Felag Móti Krabbameini er eisini glaður fyri gávuna.

- Tað hevur stóran týdning, at eitt ítróttarfelag sum Neistin stuðlar Føroya Felag Móti Krabbameini, tí júst ítróttur og likamsrørsla hevur stóran týdning í sambandi við krabbamein.

Umframt stuðulin, sum kemur inn, tá fólk ringja til 905600, fær Føroya Felag Móti Krabbameini eisini eina peningagávu frá Kaupting Bank, SMS og Føroya Tele, tá ið kappingarárið fer at halla í apríl 2008.

**dh**

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Stívt andøvagul upp í hvassan vind av vestri, seinnapartin minni vindur av útnyrðingi. Sólglottar, men eisini ælingur og hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fyrrapartin fleyr til gul av ymsum ættum, turt og sólglottar. Seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind av landsynningi og regn. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útsynningi og vestri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin minkar hann vindin niður í lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Sunnudagin veksur hann vindin upp í hvassan vind ella skrið av suðri og regn. Hitin millum 7 og 11 stig.,

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | 10 |
| Ammassalik | 2 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 2 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 13 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 7 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 11 |
| Keypmannah. | 12 |
| Helsinki | 5 |
| Moskva | 9 |
| Berlin | 17 |
| Warzawa | 17 |
| Kiev | 16 |
| Bukarest | 17 |
| Paris | 15 |
| Madrid | 21 |
| Róm | 24 |
| Malorca | 19 |
| Athen | 22 |
| Malta | 21 |
| Tunis | 24 |
| Beijing | 15 |
| New Dehli | 28 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 20 |
| New York | 21 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | 24 |
| Panama | 29 |
| La Paz | 8 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 27 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 990 hPa. í útsynning úr Íslandi fer í landnyrðing eystan og dýpist. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikunáttina.




**Í dag:**
Lágtrýstið eystan fyri Ísland fer í landnyrðing. Ein veikur hátrýstryggur vestan fyri Ísland verður yvir Føroyum hósmorgunin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 23/10 kl. 06⁰⁰ – 24/10. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,6°
Minsti hiti máldur í oktober: -4,0° - Mesti hiti máldur í oktober: 18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 8,0 mm – mált frá 20/10 kl. 06⁰⁰– 21/10 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í oktober: 88,0 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

26. oktober Fullmáni/Mánin næstur jørðini
1. november Seinna kvarter
9. november Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 30 . okt. | 09.47 | 22.17 | 08.47 | 21.17 | 09.02 | 21.32 | 11.47 | - | 00.17 | 12.47 | 08.02 | 20.32 | 07.02 | 19.32 | 10.02 | 22.32 | 11.02 | 23.32 | 09.32 | 22.02 | 10.47 | 23.17 |
| 31 . okt. | 10.47 | 23.28 | 09.47 | 22.28 | 10.02 | 22.43 | 00.17 | 12.47 | 01.17 | 13.47 | 09.02 | 21.43 | 08.02 | 20.43 | 11.02 | 23.43 | - | 12.02 | 10.32 | 23.13 | 11.47 | - |





